LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

BILUR TIL SØLU
Kia Sephia, aut. gear, frá Aug. 1999. Prísur kr. 25.000,-. Bara havt ein eigara.
Tlf. 319056/519056

TIL SØLU
Strada 4x4, árg. 95, nýggj dekk, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 282710

HONDA CIVIC 1.6I BENSIN
160 HK, árg. 96, koyrir væl. Hevur koyrt 160.000 km. Er til sølu. Áhugað ring á
tlf. 228430

EIN TOYOTA COROLLA
ið hevur sleipikrók og sentrallás, til sølu við at venda sær til
tlf. 375044

MAZDA 323
svartur, bíliga til sølu sera væl viðfarin. Bert ein eigari.
Tlf. 260783

GOLT TD
árg. 90, til sølu fyri 7000 kr.
Tlf. 317462

GER KVETTIÐ
Ein Honda HR-V 4x4 í sera góðum standi til sølu fyri 100.000 kr. er sera væl hildin og koyrir sum ein dreymur. verður seldur vegna flyting. Ring og hoyr nærri.
216564

MAZDA PREMACY
árg. 2002, sportmodel, svartur, tónaðir rútar, 4 eyka felgur, 1 eyka setur. Koyrt 127.000 km. Sýnaður des. 2008. Kostnaður 79.000 kr.
Tlf. 585095 ella 254607

3 MANS VATNSKUTARI
til sølu við vogni.
Tlf. 590198

Alt til akfør

TIL SØLU
2 næstan nýggj píkadekk 175/65 R14 og 4 felgur/4 hol til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 312660

SUMMARDEKK TIL SØLU
4 Continenal summardekk 195/60 R15 sum nýggj fyri kr 3000 kr.
Tlf. 507310 eftir kl. 17

4 SUMMARDEKK Á FELGUM
til Citroen Berlingo til sølu fyri 2200 kr. Eru brúkt í 2 vikur. Stødd 175/70 R14 84T.
Tlf. 225988

Arbeiði

STARVSFÓLK SØKIST
Vit sóknast eftir einum persóni at arbeiða skiftandi tíðir, mánadag til leygardag. Áhugað kunnu venda sær til Kristinu á
tlf. 595958.Klædnabúðin á Torginum í Vági

REINGERINGSHJÁLP YNSKIST
Álítandi genta/kvinna ynskist til at gera reint í privathúsi á Argjum í uml. 2-3 tímar um vikuna, helst fyrrapart.
Tlf. 282252 aftaná kl. 16

Barnaútgerð

TIL SØLU
Emmaljuna classic, platina frá 13/11-2008, 3800 kr. taska, regnslag, flugunet og óbrúkt lift er við.
Tlf. 252993

TRIP TRAP BORÐSTÓLUR
til sølu fyri 350 kr.
Tlf. 312945

JUNIORSONG
bíliga til sølu, lítið og onki brúkt, sum spildurnýggj, og sera lekkur madrassa fylgir við, eisini sum spildurnýggj. prísin kunnu vit tosað um.
Tlf. 274213

BARNASONG Í FULLARI STØDD
til sølu fyri 1500 kr. Góð madrassa fylgir við.
Tlf. 581520 (Hoyvík)

EIN BRIO TVILLINGAVOGNUR
við lift, puslitasku, net og regnslag. Er sum nýggjur, ongan rust, til sølu fyri 4500,-
Tlf. 262628

AUTOSTÓLUR 3-6 ÁR
Regaro autostólur við innbygdum hátalara til CD-avspælara, 3-6 ár til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 2200 kr. vælhildin.
Tlf. 211871

SVARTUR KOYRISTÓLUR
við kalesju og regnslagið selist fyri 400 kr. brúktur til eitt barn.
Tlf. 218171

Barnaansing

HEY
17 ára gomul genta ið kann ansa barni/børnum tykkara (Í Tórshavn) meðan tit eru til arbeiðis. Mær dámar væl børn, og havi royndir við børnum.
Tlf. 264145

Bátaútgerð

TIL SØLU
Seksæringur 34' 115 HK. Mercedes Benz. Bíliga til sølu og onnur útgerð.
Tlf. 755605

Bingo

BINGO
verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 26. jan. kl. 19.00. Bingola verður spælt.
HSR

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánadagin tann 2. febr. kl. 19.00. Nógv gott at vinna, á lutaseðli føroyskur matur, olja og annað. 6. og 12. spæl 500 kr.
Kirkjukórið Ljómur

BINGO
sum var lýst at verða 02-02 verður mánadagin 09/02.
Sumbiar Dansifelag

GOTT BINGO
verður leygarkvøldið 24. februar kl. 19. Alt gott at vinna, m.a. gávukort á 500-1000 kr. Eisini verða eykaspølini spæld.
Tórshøll

BINGO VERÐUR Í PÁLLSTOVU
hósdagin kl. 19.00. Full Pláta 500 kr. Á Lutaseðli Flogferð og 2x500 kr. Bingola og eyka eyka verður. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

Burturm. /funnið

HEVUR TÚ MIST EITT DJÓR
ella funnið eitt, ring til okkum, kanska kunnu vit hjálpa. Hetta er lýsing hjá Djóraverndarfelagnum. Ætlanin við einari tílíkari lýsing er at vera millumlið millum djór og eigara, soleiðis at eigarin fær sítt djór aftur, og djórið fær sín eigara aftur. Djóraverndarfelagið skal hjálpa djórum í neyð, og hvat er meira neyðarsligt enn eitt heimleyst djór? Enn vita øll ikki, at tað kann loysa seg, at boða okkum frá, um tey hava mist eitt djór ella funnið eitt. Men ímynda tykkum tað stóru gleði, tá tað er samsvar ímillum hesi bæði horvnu og funnu djórini? Tað hendir faktisk rættiliga ofta. Men eisini ofta ikki. Summi djór eru sporleyst forsvunnin, og onnur verða funnin uttan at nakar spyr eftir teimum, og tá royna vit at finna nýtt heim. Onkuntíð spyrja fólk eftir djórinum hjá sær, ganga ør og leita, samstundis sum onkur annar ringir og sigur: »Tú, her gongur ein hundur, hann sær ikki út til at vita, hvat hann skal, hann gekk eisini her ímorgun.« »Hav hann hjá tær, fólk leita eftir honum, tey eru á veg.« Seinasta sólskinssøgan var um 17 ára gomlu, deyvu Barbie, ið var sloppin út, tí portrið stóð opið, hon var burtur í eina nátt. Hon var endað úti á Statoil á Viðarnesi, har oljubilarnir fylla tangan. Til alla lukku møtti hon tveimum fittum monnum, ið undraðust á, hví her gekk ein hundur einsamallur og mól. Teir vistu, hvar teir skuldu ringja, nevniliga Djóraverndarfelagið, tlf. 504533.Nú skuldi ikki verið neyðugt at biðið fólk um ALTÍÐ at lata hundin hava hálsbandið á. Navnaskelti fæst m.a. hjá Valdemar Lutzen, kostar ikki eina formúu. Øll djór eiga at vera merkt, antin chipsmerkt ella hava hálsband við navnið. Tað er tann lættasti mátin at fáa djórið heimaftur. Fyri ikki at siga einasti mátin, um tey enda hjá løgregluni. Vit takka øllum hjartagóðum djóravinum, ið tíma at taka sær av burturkomnum djórum.
Djóraverndarfelagið

Býli í Føroyum

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Lítil íbúð er til leigu stutt frá miðbýnum.
Tlf. 220586 millum kl. 13-18

HÚS Í VESTMANNA TIL LEIGU
hugnalig, til leigu.
Tlf. 508575-521775

ÍBÚÐ Í HAVN
Eg eri ein ung genta, ið ynski eina lítla íbúð til leigu fyri rímiligan prís. Eg hvørki royki ella drekka og havi fast arbeiði. Teldupost: **ibud2009@hotmail.com** ella
tlf. 261915

TILKOMIN KVINNA
við einum barni ynskir lítil hús ella íbúð til leigu. Má hava 3-4 kømur. Eru friðaligar, roykja ikki. Max 5.000,- við øllum.
Tlf. 582894

KAMAR Í TÓRSHAVN
Kamar til leigu til friðarligt fólk. Felags køk, bað, vaskimaskinu og frystiboks. Í kamarinum er song, klædnaskáp og atgongd til tráðleyst breiðband. Liggur skamt frá handilsskúlanum og 12 min. gongd frá miðbýnum.
Tlf. 280505

KAMAR Í HAVN TIL LEIGU PR. 1. FEBRUAR
Skamt frá Lærara og Sjómansskúla til friðarligt fólk.Felags útgjørdur køkur, bað, vaskimaskina og frystiboks.Í kamarinum er klædiskáp, song og atgongd til breiðband.10 min. gongd til miðbýin, gott bussamband.
Tlf. 287877 e. kl. 16

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
einlig mamma søkir íbúð skjótast gjørligt, 5000 kr. um mðn. við øllum. Fari væl um og gjaldi til tíðuna.
Tlf. 580840

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNKIST
Tilkomið par við 2 føstum inntøkum ynskja hús ella íbúð til leigu í Tórshavnar kommunu.
Tlf. 582382-262524

HÚS ELLA ÍBÚÐ
søkist til leigu beinavegi, havi fast arbeiði og gjaldið til tiðina. Max 6000-7000 kr.
Tlf. 210126

ÍBÚÐ YNSKIST
einlig mamma við einum barni søkir íbúð í Tórshavn max 5000 kr. við øllum, skjótast gjørligt.
255327

KAMAR Í HAVN TIL LEIGU
Hevur atgongd til felags køk, baðirúm og vaskikjallara. Er klárt at flyta inní beinanvegin. Í kamarinum er song, klædiskáp, borð, stólur, sjónvarp og hondvask. Gott samband til buss. Kr. 3.000,- um mðr íroknað ljós og hita.
Tlf. 233373

ÍBÚÐ UNDIR BRÚNNI
Gongd, stova/køkur, 2 kømur, baðiverilsi, vaskimaskina. Íbúðin er uml. 70 m2. Møguleiki er fyri at leiga við møblum.
Tlf. 315811

ÍBÚÐ
64 m2 stór íbúð, 2 kømur til leigu frá 1. feb. 2009 til friðarlig hjún ið ikki roykja ella drekka, 4.000 kr. um mðn. uttan el og hita. Depositum 3.000 kr.
Tlf. 273861

ÍBÚÐ TIL LEIGU
í vesturbýðnum frá 1. feb. 43 fermetrar, kostar kr. 4500 um mðn. við hita uttan el. depositum kr. 5000, gongd, stovu, wc, kamar og køk.
Tlf. 507310 eftir kl 17

ÍBÚÐ ELLA HÚS
Tilkomið par við føstum inntøkum ynskja íbúð ella hús til leigu í Tórshavnar kommunu.
582382 ella 262524

HÚS Í SUÐUROY!
Stór, møblerað hús við øllum vanligum hentleikum til leigu á Nesi í Vági í stytri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 573054

HÚS Í SKOPUN TIL LEIGU
eru í 3 hæddum, loft: 4 kømur og wc, miðhædd: køkur, stova og vaskirúm, kjallari: goymsla og garaga.
Tlf. 221232

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung hjún við einum barni á veg leita eftir íbúð í høvuðsstaðarøkinum at leiga um uml. 3. mðr. Roykja og drekka ikki, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 224364

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
2 stór kømur, stova/køkur, baðiverilsi, uml. 80fermetrar, 15 min. gongd til miðbýin, náttúruvakurtog friðarligt umhvørvi. Kr. 5.000 pr. mðn. umframt el og olju. Til
ikki-roykjarar.foeroyar@gmail.com

VERILSI TIL LEIGU
á Hoyvíksvegnum 36A við atgongd til køk og bað.
Tlf. 211208

Býli uttanlands

SUMMARFRÍ Í BULGARIA
Leiga 3 kamars íbúð við 8 seingjarplássum í fyrsta floks hotel og íbúðarkompleksi við Svarta havið við øllum hentleikum. Td. 2 vikur í juli úr 5.500 pr. pers incl. flogferð úr Føroyum. Fleiri íbúðir kunnu útvegast.heimasíða: solferia.googlepages.com, solferia@gmail.com
Tlf. 590453

ÍBÚÐ Á AMAGER
par við einum barni, vilja leiga íbúð á Amager í 1 ár frá feb-mars. Í íbúðini skulu í minsta lagi vera 3 kømur. Flyta til DK í arbeiðsørindum.
210037

ÍBÚÐ YNSKIST
par í søkir íbúð í kbh umráðinum, roykja ikki og fara væl um.
Tlf. (+45) 28891183 Palli

ÍBÚÐ YNSKIST Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar, ið eigur eina íbúð í Keypmannahavn at leiga mær í styttri tíðarskeið.
Tlf. 251742

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki